## Høvundur heiðurspláss

Sum tann fyrsti íslendski rithøvundurin hevur Ólafur Jóhann Ólafsson hevur fingið O'Henry-bókmentavirðislønina. Hana fær hann fyri stuttsøgusavnið Aldingarðinn, sum hann fekk íslendsku bókmentavirðislønina fyri í 2006, og sum árið eftir varð kosin sum ein av teimum bestu í Bretlandi, tá hon kom út í enskari týðing. Ólafur Jóhann Ólafsson sigur, at hann er fegin um heiðurin, sum høvundar sum Hemingway og Steinbeck hava fingið fyrr.



## Ikki longur fiskurin

Í mong ár hevur fiskivinnan átt tey størstu tølini í íslendsku lønarhagtølunum, men soleiðis er ikki longur. Framrokningar vísa, at í ár fer aluminiumsvinnan at rinda sínum starvsfólki 13,5 mia. íslendskar krónur í lønum, og tað er líka nógv, sum fiskivinnan rindar sínum starvsfólki, skrivar Morgunblaðið. Tølini vísa, at aluminiumsvinnan gevur nógv størri avkast til samfelagið enn toskurin, 54 mia. krónur ímóti 38,4 mia. krónum.




*Skulu vit gjalda meiri í barnsburðarskipanina, skulu vit eisini hava valdið á henni, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag á aðalfundinum um vikuskiftið*

# Gjald og vald skulu fylgjast

**Ingeborg Vinther fegnast um, at samgongan ætlar at bøta um barsilsskipanina, men skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava rokningina, skulu teir eisini hava valdið**

BARNSBURÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður tosað um at leingja barsilstíðina upp í eitt ár, og samstundis skulu páparnir nú fáa álagt við lóg at vera heima hjá barninum ávíst tíðarskeið í hesum árinum, barnsburðarfarloyvið varar.

Tað fegnast Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag um á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Barnsburðarskipanin er ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir gjalda. Men Ingeborg Vinther staðfestir, at eins og ALS, er heldur ikki Barsilsskipanin nøktandi fyri tímalønt

Ingeborg Vinther sigur alt gott um, at tað skal vera møguligt at vera heima hjá barninum í eitt ár.

- Men tað krevur, at inngjaldið til Barsilsskipanina hækkar. Og tað merkir so aftur, at antin mugu partarnir á arbeiðsmarknaðinum gjalda meir, ella má landskassin gjalda tað, sum í restar.

Ingeborg Vinther staðfestir, at tað, sum samgongan ætlar, er, at tað skal vera arbeiðsmarknaðurin, sum skal gjalda eykarokningina.

- Tá er lagamanni hjá samgonguni at leingja barsilstíðina, tá ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu gjalda. Men samstundis er tað eisini ætlanin, at landsmyndugleikarnir framvegis skulu hava valdið á skipanini, so at teir kunnu áleggja arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum fleiri og fleiri gjøld.

- Men skulu vit gjalda, mugu vit eisini hava ábyrgdina og stýrið á skipanini. Alt annað er heilt burturvið, staðfestir Ingeborg Vinther.

# Bjóða fleiri feløgum upp í Samtak

**Tey trý feløgini, sum hava tikið seg saman um felagsskapin Samtak, vilja fegin hava fleiri feløg upp, men enn hevur ongin tikið av**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað var eitt gott tiltak, tá ið Havnar Arbeiðsmanna felag, Føroya Arbeiðarafelag og Fiskimannafelagið, tóku seg saman í fjør og stovnaðu Samtak.

Tað staðfesti Ingeborg Vinther á aðalfundinum í felagnum nú um vikuskiftið.

Hon vísti á, at fakfelagsrørslan hevur í nógv ár ætlað at skipa seg í tætt samstarv og eitt stig á leiðini varð tikið í fjør, tá ið Samtak varð stovnað.

- Við Samtaki ætla feløgini í størri mun at seta dagsskránna, segði Ingeborg Vinther.

Enn eru tað bara hesi trý feløgini, men tey hava bjóðað hinum arbeiðarafeløgunum við í samstarvið.

- Vit hava eisini vent okkum til Handverkarafelagið og bjóðað teimum við í samstarvið.

Men enn hevur ongin tikið av og í Samtaki bíða tey nú eftir svari.

Og Ingeborg Vinther heldur avgjørt, at fleiri feløg skuldi komið við

- Jú fleiri feløg, ið eru við, tess sterkari verður felagsskapurin.

Hon ivast ikki í, at Samtak hevur stóran týdning fyri feløgini, og at lurtað verður eftir tí, ið kemur frá felagsskapinum.

Hon sigur, at eitt, sum Samtak ger, er at royna at fáa ávirkan á tey lógaruppskot, ið koma til viðgerðar á Løgtingi.

- Nógv samband hevur verið ímillum Samtak og undanfarnu samgongu, og eg ivist ikki í, at samstarv verður eisini við hesa samgonguna, so vit fáa okkara ávirkan, har vit halda, at tað er neyðugt at gera vart við okkum, sigur Ingeborg Vinther.

Umframt samtak, hevur Føroya Arbeiðarafelag eisini samstarv við Nordisk Union og felagsskapir í Evropa, umframt annað altjóða samstarv umvegis norðurlendskar samstarvsfelagar.

- Hetta er eisini neyðugt, til tess at vit kunnu fylgja við og vera við í tí, sum hendir uttan fyri Føroyar, sigur Ingeborg Vinther.